## DAGSINS MEINING

# Ikki hevnd men rættvísi

Ein av heimsins mætastu antinazistum, Simon Wiesenthal, er deyður 96 ára gamal. Hann var føddur 1908 í eini bygd í Eysturríki og kom frá fyrsta degi av at kenna antisemitismuna uppá sín kropp. Hann yvirlivdi á undurfullan hátt uppihaldi í ikki minni enn 12 kz legum og slapp í 1945 livandi út úr Mauthausen, ið var ein av teimum ræðuligastu legunum. Wiesenthal gjørdist skjótt eitt livandi hugtak við tað, at hann beint eftir stríðslok fór undir at jagstra teir verstu nazi brotsmennininar, sum vóru sloppnir til rýmingar.

Eftir stríðslok arbeiddi hann á eini amerikanskari dokumentatiónsmiðstøð. Har gekk tað av álvara upp fyri honum, hvussu ræðulig og umfatandi týningin av fóki hansara hevði verið í Nazitýsklandi og í hersettu londunum serstakliga eystanfyri eitt nú Póllandi. Wiesenthal øtaðist yvir ta líkasælu, ið valdaði og hann var sera harmur um, at áhugin fyri at gera upp við nazismuna ikki var størri í eftirkrígstíðini. Hann fór tí undir eitt miðvíst kanningararbeiði at leita upp allar teir verstu nazibrotsmenninar fyri at fáa teir fyri rættin. Hetta starv hansara eydnaðist framúr væl. Honum eydnaðist at finna heilt nógvar av teimum vestu brotsmonnunum og síggja til, at teir komu fyri rættin.

Wiesenthal var onga løtu yvirtikin av hevndarhugi, Hann vildi júst ikki hava hevnd, men hann vildi hava rættvísi. Við at tryggja at rættvísin sigraði vildi hann tryggja øllum teimum milliónunum, sum nazistarnir týndu, uppreisn. Hann var ein maður, sum mangan nógv rok var um, og hann var ofta í stríð við sítt egna fólk. Hann var sera atfinningarsamur mótvegis statinum Ísrael, og mælti staðiliga til sótt og semju heldur enn til stríð. Hann var ein stórur humanistur og ein framúrskarandi rithøvundur og eftirmæli hansara verður uttan iva, at hann var ein av teimum heilt stóru persónmenskunum frá einum tíðarskeiði, har øll menniskjanslig virði vóru undir stórum trýsti.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skúlin í Hoydølum í andróðri

**Pól Jespersen**
*studentaskúlalærari*

1. september fylti Føroya Studentaskúli og HF-Skeið 68 ár. Leingi var hann einasti skúli av sínum slagi í landinum, og hann er framvegis størstur í sínum bólki og eisini bíligastur í rakstri roknað fyri hvønn næmingin. Tað er eingin ivi um, at hesin skúlin hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri menningina í okkara lítla landi. Helst nógv størri, enn tey flestu geva sær far um.

**Hoydalar**
Síðan fyrst í 60´árunum hevur skúlin hildið til í Hoydølum. Teir 530 næmingarnir og einir 75 leysir og fastir lærarar húsast í sjálvum skúlabygninginum, sum fyllir 40 í ár, og í tveimum húsum, sum í síni tíð hýstu tuberklasjúklingum. Tey bæði húsini eru nú ávikavist 72 og 97 ára gomul.

Í 82 varð skúlin í Eysturoy settur á stovn. Tað lætti nakað um trýstið í Hoydølum, men eftir fáum árum var støðan aftur tann sama, og fyrst í 90´árunum kom av álvara gongd á kjakið, at nú mátti nakað gerast. Arkitektakapping varð útskrivað at útbyggja og umbyggja skúlan. Hon varð avgreidd í 1994. Vinnarauppskotið varð sett í forhøllina, og har stendur tað enn.

Í 97 fylti skúlin 60 ár. Landsstýrismaðurin møtti upp at ynskja til lukku, og so læt hann bumbuna bresta. Útbyggingin í Hoydølum varð av ongum. Byggjast skuldi í staðin ein depil í Marknagili.

**Arbeiðsumstøðurnar**
Nú er av álvara farið at treingjast um í Hoydølum, bæði so og so. Umhvørvið er annars heimsins besta at halda skúla í, men tað sigur seg sjálvt, at so gamlir bygningar lúka ikki nútíðar krøv. Undirvíst verður í alt ov smáum hølum við ongari útlufting. Tá ið tímarnir byrja, nærkast hitin eftir lítlari løtu 30 stigum. So er at lata upp hurð og vindeyga - í fleiri stovum fæst bara eitt av 4 vindeygum upp. Næmingarnir kunnu so sita og kulsa. Her eru líkasum bara tveir møguleikar, sum hvørgin fremur nakra hugsavnan. Tað er heilt vist, at tað eru ikki nógv onnur starvsfólk hjá tí almenna, sum høvdu latið sær slíkar arbeiðsumstøður lyndað, hvørki í landsstýri, mentamálaráði, brunaumsjón ella arbeiðseftirliti.

Í 1999 varð útbúgvingarálit skrivað. Á kunnandi fundi í Hoydølum læt ein nevndarlimur okkum vita, "at tað er á miðnámsøkinum, teir stóru pengarnir eru at spara. . ." . So vistu vit tað, men tá varð longu spart inn at beini. Av árligu játtanini fara nøkur og hálvfems prosent til lønir. Tá ið einir tveir mánaðir eru farnir av skúlaárinum, koma boðini: "Nú skal ikki keypast meira í ár". Her er eingin bøn, heldur ikki í lærugreinum, sum krevja amboð til at gera royndir. Í mong ár hevur játtanin til søvn og vanligt viðlíkahald ikki verið nøktandi. Tí forfalla bæði bygningar og søvn. Foreldur hava tað á orði á foreldrafundum.

**Skúlavegurin**
Av parkeringsplássum eru á hesum stóra arbeiðsplássi bara helvtina so mong, sum brúk er fyri. Tí standa bilar eisini parkeraðir har, sum forboðsskelti av trygdarávum eru sett upp. Omankoyringin til skúlan er ein søga heilt fyri seg. Í fleiri áratíggju hava myndugleikar, almennir og kommunalir, trætst um, hvør hevur ábyrgdina av hesum vegastubba. Tað gera teir enn, og tí verður einki gjørt, hóast ein liðug verkætlan lá á borðinum fyri næstan fjórðingsøld síðani. Seinast ið frættist frá hesum máli, var tað farið í ein arbeiðsbólk í Mentamálaráðnum.

**Ófriður um upptøku**
Í próvtøkutíðini í vár var sum kunnugt ófriður um skúlan í Hoydølum (og aðrar miðnámsskúlar). Ikki av omanfyri nevndu ávum, men av næmingaupptøkuni til komandi skúlaár. Arbeiðslagið hjá Mentamálaráðnum førdi til, at skikkaðir næmingar í hópatali til miðnámsskúlarnar alt ov leingi vórðu hildnir í óvissu um upptøkuna. Haraftrat vórðu nógvir næmingar avvístir. Eftir at málið varð viðgjørt í fjølmiðlunum og eftir mótmæli bæði frá lærarum og foreldrum ljóðaði frá myndugleikunum, at nú skuldu kortini allir skikkaðir næmingar til studentaskúlar og hf-skeið verða tiknir upp, sum síður hevur verið í mong ár. Tað skuldi Mentamálaráðið síggja til, so ella so.

Í summarfrítíðini var so eitt lítið millumspæl, tá ið vit í útvarpsviðtali hoyrdu rektaran siga frá, at nú hevði hann mist alla vón um bata. Hetta var í sambandi við ætlaða depilin í Marknagili.

Í tí skili byrjaði nýtt skúlaár. Dagin, tá ið byrjað varð, visti leiðslan ikki fyri vist, hvussu nógvir flokkar skuldu vera. Á málsligu deild vóru eftir boðum úr Mentamálaráðnum møttir 76 næmingar, sum fyribils vórðu settir í 3 flokkar við 24, 26 og 26 næmingum. Haraftrat stóðu nakrir næmingar á bíðilista. Mentamálaráðið visti fullvæl, at Yrkisfelagið hevði verið í drúgvum, dýrum og beiskum verkfalli um næmingatalið í flokkunum. Ikki við hølisviðurskiftunum í huga, men av námsfrøðiligum ávum, sum væl og virðiliga er grundgivið fyri í bløðunum. Á náttartíð varð tá niðurfeld ein semja, at næmingatalið í flokkunum skuldi vera í mesta lagi 24. Tó kundi í heilt serligum føri verða vikið frá hesi reglu; hugsað varð t.d. um, at onkur AFS næmingur kanska kundi verða tikin upp í ein fullan flokk. Ella at onkur næmingur flutti heimaftur úr útlondum. Tað líkist ongum, at Mentamálaráðið ikki virðir hesa semju, tí her er als ikki talan um serstakar umstøður. Ráðið visti umsøkjaratalið longu hálvan mars, men tað hevur ligið á boðunum og hevur, hóast eykajáttanir og politiskt trýst, ikki gjørt sítt arbeiðið til lítar.

Tað er beiskt hjá yf-limum at vita sær, at nýggja skúlaárið byrjaði, sum tað farna endaði, við ófriði. Tað er eisini beiskt hjá nýggjum miðnámsskúlanæmingum, og foreldrum, at stríð skal vera um teirra flokk frá fyrsta skúladegi. Skommina eigur Mentamálaráðið einsamalt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.